# Landsstevnan hjá Javna 2000

*Havn leygar- og sunnudagin 6. og 7. mai*

Í ár verður landsstevnan skipað sum ein mentunarstevna, har vit seta tey menningartarnaðu í fokus. Hetta gera vit við at sýna fram nøkur av teimum avrikum, tey menningartarnaðu arbeiða við til dagligt.

Stevnan byrjar við skrúðgongu frá Bursatanga kl. 10.00, niðan í SMS og oman í Grasagarð har mentunarstevnan verður sett.

Her verður tónleikur, fimleikaframsýning, felagssangur og talur. Tit fáa eisini møguleika at keypa heitt kakao og nýbakaðar bollar.

**Síðani verða framsýningar**

Í Smiðjuni í Lítluvík verður umfatandi málningaframsýning, har umleið 25 menningartarnaði sýna fram. Her verður eisini høvi til at keypa listaverkini.

Á Virkni kunnu vit eisini síggja alt tað arbeiðið, sum gjørt verður á teimum vardu verkstøðunum kring landið. Her sýna verkstøðini fram nakað av teimum lutum, sum tey gera. Eisini her verður møguleiki at keypa nakað av tí, tey hava avrikað. Og sjálvandi verður eisini møguleiki at vitja ta sera áhugaverdu framsýningina um havið. Her fáa tit møguleikan at brúka allar tykkara sansir við at fara ein túr eftir havsins botni.

Umframt framsýningarnar sum halda áfram sunnudagin, verður ein guðstænasta í Havnar kirkju kl. 11.00, sum er rættað móti teim menningartarnaðu og avvarandi teirra.

Sum vanligt verður veitslan leygarkvøldið, og her vilja vit leggja dent á, at vit fáa eina stuttliga og hugnaliga veitslu. Veitslan, sum verður í Badmintonhøllini, byrjar leygarkvøldið kl. 18.00. Her verður borðreitt við góðari súpan, oksasteik, frukt við rákremi, sangi, skemti, horn- og rytmuorkestri og harmonikudansi.

Veitslan kostar kr. 150 fyri vaksin og kr. 100 fyri børn.

Tilmelding á skrivstovuni hjá Javna á tlf. 31 48 27 ella á fax 31 05 57. Seinasta freist at boða frá luttøku er fríggjadagin 28. apríl 2000.

Endalig skrá verður lýst í bløðunum seinni.

# Philippe við Aprílbólkinum

Tann 20. apríl letur listarbólkurin Aprilgrupen upp árligu listarframsýning sína í Baunhøj Mølle í Grenaa í Jyllandi.

Aprilgruppen er ein danskur listarbólkur, ið byrjaði í 1982, og sum hvørt ár síðani hevur havt hesa framsýning. Í bólkinum eru Hans Clausen, Ruth Falk, Maud Sinclair, Ole Stenholm og Ketty Steffansen, og fáast tey við ymiskar listargreinir, - málning, vatnlitir, foto og grakikk.

Á hvørjum ári verða ein ella fleiri onnur listarfólk boðin við á framsýningina, og í ár er so Philippe Carré úr Havn boðin við, saman við einum keramikara úr Risskov, einum grafikara úr Stuttgart og einum málara úr Rønne. Framsýningin í Baunhøj Mølle í Grenaa er opin frá 20. apríl tl 17. mai.

# Rud í Gallarí Oyggini

Frá 27. apríl til 11. mai sýnir Jørgen Ru, listamaður, fram í Gallarí Oyggini á Tvøroyri. Hann er dani og hevur havt nógvar framsýningar ymsastaðni í Danmark og uttanlands.

# Ellisakførini luftað flaggdagin

Sum siðvenja er vorðin seinastu árini verða ellisakførini luftað flaggdagin.

Tað er felagið Føroya Ellisakfør, sum nú í fleiri ár hevur skipað fyri framsýning og raðkoyring við ellisakførum undan og eftir flaggdagshaldið í Havn.

Eins og í fjør hittast ellisakførini á Statoilstøðini í Gundadali, og higani verður koyrt oman á Kongabrúnna, har akførini verða sýnd fram á ósanum meðan flaggdagshaldið er.

Aftan á flaggdagshaldið verður koyrt niðan aftur á Statoilstøðina í Gundadali, har akførini eisini verða sýnd fram, meðan limirnir í Føroya Ellisakførum kunnu njóta eina kaffimunn o. a. gott, sum Statoilstøðin bjóðar.

Aftan á tiltakið verður opið hús í hølunum hjá Føroya Ellisakførum yvir við Strond 22.

– Sum nakað serligt hesaferð fara vit at koyra út í brunnin við Gráastein við ellisakførunum, sigur Brynjálvur Jensen, formaður í Ellisakførum. Felagið er í løtuni í ferð við at innrætta gamla vatnbrunnin til felagshøli við tí í hyggju at gera eitt tekniskt fornminnissavn.

Tey, ið ikki hava sæð brunnin, hava nú møguleikan at koyra út higar í ellisakførum flaggdagin.

*Hesin Ford TT hjá Vatnsoyra Bilasavni er sama slag sum fyrsti bilur, ið kom til Føroya í 1922*



# Styrkja økissamstarvið í Norðuratlantshavið

*– Tað tykist sum gongdin í altjóða felagskapum sum CITES er ov lættliga ávirkað av teimum vælkendu upplýsingarherferðunum hjá áhugafelagskapum sum Greenpeace og WWF, sum framvegis halda, at forboð er tað sama sum stovnsrøkt. Hetta kunnu vit sjálvsagt ikki góðtaka, sigur Jørgen Niclasen í tíðindaskrivi*

Ólavur í Beiti

CITES, sum er altjóða felagsskapur grundaður á sáttmálan um handil við hóttum villini djóra-og plantusløgum, hevur sín 11. ársfund í Kenya í hesum døgum. Undan fundinum hevði Noreg sett fram uppskot um aftur at loyva millumlanda handli við sildreka. Norska uppskotið fekk 52 atkvøður fyri, meðan 57 lond vóru ímóti.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, heldur, at úrslitið er eitt álvasamt bakkast fyri burðardygga gagnnýtslu og menning í altjóða hølpi. Men samstundis haldi eg, at hetta skal tulkast sum ein nýggj avbjóðing til londini kring Norðuratlantshavið um at seta fulla ferð á økissamstarvið í framtíðini, sigur Jørgen Niclasen.

Norska uppskotið fekk minni undirtøku hesaferð, enn tá Noreg seinast legði sama uppskot fram á 10. CITES ársfundinum i 1997 um at flyta sildrekastovnarnar í norðurhøvum av lista 1 (handilsforboð) til lista 2, sum loyvir millumlanda handli við strongum eftirlitskrøvum. Fyri, at eitt slíkt uppskot kann verða samtykt, mugu í minsta lagi 2/3 av limalondunum atkvøða fyri.

**CITES smittað**

– Høvuðstrupulleikin sýnist at vera tann, at sama sjúkan sum leingi hevur forðað IWC í at loyva stórhvalaveiðu aftur, nú eisini hevur smittað CITES. Hetta er sera álvarsamt, tá hugsað verður um, at CITES er ein altjóða felagskapur við 150 limalondum, í mun til tey bert uml. 40 limalondini í IWC, sigur fiskimálaráðharrin í tíðindaskrivi.

– Tað tykist sum gongdin í altjóða felagskapum sum CITES er ov lættliga ávirkað av teimum vælkendu upplýsingarherferðunum hjá áhugafelagskapum sum Greenpeace og WWF, sum framvegis halda, at forboð er tað sama sum stovnsrøkt. Hetta kunnu vit sjálvsagt ikki góðtaka.

– Vit hava fylgt við í fyrireikingunum til CITES fundin gjøgnum beinleiðis samstarv okkara við grannalondini Noreg, Ísland og Grønland. Donsku myndugleikarnir, sum umsita CITES, hava ikki havt áhugamál hjá hvalaveiðulondunum í Norðuratlantshavinum fremst í huga í sambandi við sínar fyrireikingar til fundin í Kenya í ár. Vit fingu í seinasta løtu høvi at koma við okkara sjónarmiðum. Donsku myndugleikarnar høvdu ikki sent okkum norska uppskotið til ummælis, tá ið tað varð formliga sent út í heyst, sigur Jørgen Niclasen.

**ES-fyriskipanir**

Sum ES limaland hevur Danmark bundið seg til ES-fyriskipanir í CITES og danska støðan á CITES-fundum er fyrst og fremst samskipað í ES-høpi. Á CITES fundinum í Kenya var felagsstøðan hjá ES ímóti norska uppskotinum. Sum ES-limaland kann Danmark ikki atkvøða ímóti felagsstøðuni hjá ES, men kann bert lata vera við at atkvøða vegna grønlendsk og føroysk áhugamál. Hetta er eisini ein av høvuðsgrundunum til, at Landsstýrið higartil ikki hevur mælt til, at CITES sáttmálin verður settur í gildi fyri Føroyar.

– Eftir henda fundin í CITES er tað nú ein uppaftur størri spurningur, um tað yvirhøvur loysir seg at binda Føroyar til CITES. Lagnan hjá norska uppskotinum á CITES fundinum gevur okkum heldur eitt greiðar grundarlag fyri at styrkja økissamstarvið í Norðuratlantshavið — ikki bert um umsiting og granskning av hvalastovnunum gjøgnum NAMMCO - men kanska eisini í mun til samstarvsmøguleikar fyri handil, sigur Jørgen Niclasen at enda í tíðindaskrivinum.

# Djúpt sár í okkara stoltleika sum siglandi tjóð

*Fyri at vera skipari í danska handilsflotanum, er tað ein fortreyt, at tú ert danskur ríkisborgari, tí vil Heðin Mortensen hava at vita frá Høgna Hoydal, hvussu verður hjá føroyskum skiparum á donskum skipum*

ÓLAVUR Í BEITI

Í tveimum spurningum vil Heðin Mortensen hava at vita frá sjálvstýrismálaráðharranum, í fyrsta lagi, hvønn ríkisborgararætt fara føroyingar at hava, um so verður, at Føroyar gerast fullveldi, og í øðrum lagi, hvat ítøkiligt ætlar landsstýrið at gera, fyri at føroyskir sjómenn ikki skulu missa rættindini til at sigla sum skiparar í danska handilsflotanum, um føroyingar missa danska ríkisborgararættin?

Í viðmerkingunum, sigur Heðin Mortensen, at danskir politikarar hava gjørt greitt, at um Føroyar gerast fullveldisríki, so verða føroyingar noyddir at velja ímillum føroyskan ella danskan ríkisborgararætt. Talan verður ikki um nakran felags ríkisborgararætt.

– Fyri at vera skipari í danska handilsflotanum, er tað ein fortreyt, at tú ert danskur ríkisborgari. Tí noyðast teir føroyingar, sum í dag manna hesi størv, eftir galdandi skipan annaðhvørt at flyta til Danmarkar at búgva, ella at finna sær eitt nýtt starv, um Føroyar gerast fullveldi.

– Hetta merkir ikki bara, at vit fáa eina fólkafráflyting, har skiparar við familjum stinga í sekkin, men hetta verður so sannliga eisini eitt djúpt sár í okkara stoltleika sum siglandi tjóð, sigur Heðin Mortensen í viðmerkingunum.



Bilpakkar summarið 2000
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
4 fólk í bili
Danmark
Fráf. Tórshavn 19/5 26/5 2/6 9/6 1/9 8/9
Fráf. Hanstholm 13/5 20/5 27/5 3/6 10/6 17/6 19/8 26/8 2/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hanstholm ella hinvegin
úr 775,- fyri hvønn
Noreg
Ferðist bíliga, Tórshavn-Bergen ella hinvegin
úr 480,- fyri hvønn
Hetland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Lerwick ella hinvegin
úr 385,- fyri hvønn
Ísland
Fráf. Tórshavn 17/5 24/5 31/5 7/6 14/6 21/6 9/8 16/8 23/8 30/8
Fráf. Hanstholm 25/5 1/6 8/6 15/6 22/6 24/8 31/8 7/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Seyðisfjørður ella hinvegin
úr 728,- fyri hvønn
Skotland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hetland-Skotland ella hinvegin
úr 1.273,- fyri hvønn
e-mail: booking@smyril-line.fo
team • 31 65 11

# Hava fingið gávu sum teir vónandi ikki fáa brúk fyri

*Sløkkiliðið og bjargingarfelagið í Suðuroyar Norðaru helvt hava nú fingið eina stórfingna gávu. Men hetta er ein gáva, sum teir vónandi ikki fáa brúk fyri*

Áki Bertholdsen

–So leingi bilar koyra á vegnum, henda eisini vanlukkur.

Hetta veit Ásbjørn Berg, koyrilærari í Suðuroynni kanska meiri enn nakar annar.

Og hann veit eisini, at tá ið vanlukkurnar henda, ræður um at vera so væl fyrireikaður og so væl útgjørdur sum tilber, fyri at kunna hjálpa so væl, sum tilber.

Men Ásbjørn Berg er eisini formaður í Lions Klubbanum í Suðuroynni.

Lions klubburin í Suðuroy tók í fjør stig til at fara undir innsavning til at útvega Bjargingarfelagnum og Sløkkiliðnum í norðaru helvt Suðuroynni útgerð til at fáa fólk leys, sum sita føst í bilum aftaná eina vanlukku.

Talan er um ein framkomnan saks, sum bæði kann brúkast at klippa bilar sundur við og til at spenna teir sundur við.

Frammanundan er ein saksur í Vági, men feløgini í Norðaru helvt hava leingi ynskt sær ein slíkan

Tá ið saksurin varð handaður feløgunum týskvøldið segði Ásbjørn Berg, at hetta var tað størsta, einstaka hjálpartiltakið, sum Lions Klubburin í Suðuroy hevur staðið fyri.

Saksurin kostar næstan 100.000 krónur og hóast Lions hevur goldið nógv tann størsta partin, hava eisini kommunurnar í Suðuroyar Norðaru Helvt, umframt Føroya Lívstrygging og Tryggingarfelagið Føroyar stuðlað heilt væl við peningi.

Umframt saksin, er talan um ein motor, sum drívur saksin, og eisini ein hondpumpa, at hava til taks, um motorurin ikki skuldi virka.

**Vónandi ikki brúk fyri**

Tá ið Ásbjørn Berg handaði teimum saksin vónaði hann, at teir ongantíð fingu brúk fyri honum.

Men tað skerst ikki burtur, at tá ið so leingi bilar eru á vegunum, henda vanlukkur.

Nullloysnir og aðrar góðar hugsjónir, helt hann vera hvørvisjónir.



*Sigurð Guðmundssen í Vági roynir saksin á einum bilvraki. Trónd Nolsøe, pørtørur, h.m. og Torfinn Mortensen, hyggja at*

Í koyrifrálæruni fingu næmingarnir at vita, at tað henda runt roknað 1.600 ferðsluóhapp í Føroyum um árið.

– Vit fortelja næmingunum, at eini 100 fólk í Føroyum meiðsla seg í ferðsluni um árið, 10 fólk doyggja.Og av teimum 10, eru trý børn.

**Tey eldru skulu ganga undan**

Hann helt, at tað verður mangan lastað teimum ungu fyri at koyra vilt og at vera høvuðsorsøkin til vanlukkur.

– Men veruleikin er, at tað eru tey allarfægstu ungu, sum ikki duga sær hógv í ferðsluni, segði hann.

– Men tað liggur í sjálvari natúruni hjá teimum ungu, at bera seg býtt at viðhvørt.

Og Ásbjørn Berg helt eisini, at tey eldru hava sína stóru skyld av hesum.

–Tey eldru áttu at gingið undan sum góðar fyrimyndir. Men fari ein dag og hyggi tykkum um, og kanni eftir, hvussu tey eldru koyra, hvussu tey parkera, hvussu tey stilla seg á vegnum, tá ið tey skulu sneiða á einum vegamóti o.s.fr.

Hann helt, at alt hetta var við til at máa støðið undan virðingini fyri ferðslulógini, eisini hjá teimum ungu.

–Vit eldru eiga at ganga undan sum góðar fyrimyndir og vit eiga at rættleiða tey ungu, heldur enn at happa tey, segði Ásbjørn Berg.

# Føroya Gasssøla skipar fyri trygdarskeiði

Vit hugsa kanska ikki um tað, en vit brúka øll gass í gerandisdegnum, í heiminum, í frítíðini, á verkstaðnum, á skipasmiðjuni o. s. fr.

Í hesum sambandi heldur gasssølan AGA Føroyar trygdarskeið við heitinum Gass og trygd, í aðru viku í mai. Her fara vit at seta fokus á trygdleikan við nýtslu av øllum teimum ymisku gasssløgum.

Bakgrundin er álvvarsom, deyðsvanlukkur kunnu henda við skeivari handfaring við gassi, skeivum amboðum og vi ðmanglandi vitan um eginleikarnar hjá gassi. AGA vil vera við til at minka um tann vandan, ið kann verða við at nýta gss., Skráin fyri skeiðið sær soleiðis út:

1. Vælkomin, presentatión
2. Gassframleiðsla, hvat er gass, hvaðani kemur tað og hvussu framleiða vit tað
3. Eginleikar við gassi, hvussu uppføra gassini seg, og hvat brúka vit tey til
4. Vandin við nýtslu av gassi, hvat kann handa við skeivari handfaring av gassi
5. Trygdarfyriskipanir, hvat kunnu vit gera fyri at umganga vanlukkur
6. Arbeiðsumhvørvi, hvørjir vandar seta vit okkum sjálv í við at arebiða við gassi

Umframt tað teoretiska hevur skeiðið eisini nakrar royndir við ymiskum gassum, so sum mun á vektfyllu, flótandi gass (196gr) eins og vit fara at síggja og hoyr spreingingar og royndir við eldi.

Tað, vit vilja fáa fram er, hvussu vit handfara gass við respekt, samstundis sum vit ikki verða bangin fyri tí. Hesum náa vit best við kunnleika - sum eisini tørvur er á við vakstandi nýtsluni av gassi, eitt nú í offshore vinnuni.

Her er so møguleikin at dagføra vitanina. Skeiðið er fyri øll áhugað.

Finn Mortensen frá AGA føroyar saman við Erik Sørensen og Gert Christiansen frá AGA Danmark fyrireika fýra trygdarskeið í viku 19. Erik og Gert hava góðar royndir við at halda trygdarskeið í Danmark.

Skeiðini vara í einar 3-4 tímar. Síðani verður kjak um alt, sum hevur við gass at gera, eitt nú tað síðsta innan MISON verndargass, um eitt av teimum nýggjastu úrdráttunum ODOEOX oxygen, súrevni við sporevni - eitt væl grundað trygdartiltak við eitt nú ilt- og gasssveising, har leki kann verða vandamikil.

Afturat trygdini hava menninir frá AGA sveising sum sergrein, so um spurningar eru, er bara at spyrja, sigur Føroya GAsssøla í tíðindaskrivi.